# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Dania og Kaj í Bartalsstovu gullbrúdleyp

Týsdagin 16. desember hava hjúnini Dania og Kaj í Bartalsstovu í Syðrugøtu verið gift í 50 ár.

Dania er ættað úr Porkeri, f. 2. august 1931, dóttir Kristionnu og Hans Sørensen. Mamman doyði av havhestasjúkuni tá Dania var seks ára gomul, so hon vaks upp hjá Jastrid og Thormann Sørensen í Hvalba. Thormann var pápabeiggi hennara.

Hon kom til Havnar sum 15 ára gomul, har hon m.a. arbeiddi sum støðgenta í Taxa og hevði húspláss.

Kaj er úr Syðrugøtu, f. 26. september 1924, sonur Lenu og Hans í Bartalsstovu.

Dania og Kaj møttust í Havn, meðan Kaj gekk á stýrimansskúla. Tey giftust 16. desember 1953 og búsettust í Syðrugøtu og fingu fýra børn, tey eru: Kristianna, Hans Leo, Torry og Jógvan Páll, sum øll búgva í Syðrugøtu. Eisini vaks Hjørdis, systirdóttir Daniu, dóttir Elisabeth og Janus Petersen í Kollafirði, upp hjá teimum. Hon kom til teirra sum seks ára gomul, tá mamman doyði.

Kaj hevur m.a. siglt við trolarunum, Jóannes Patursson, Leivur Øssursson og rækjutrolarunum Hvítanesi og Logos. Hann var ein av eigarunum av Logos. Seinasta skipið hann sigldi við var rækjutrolarin Arctic Viking.

Síðan Kaj bleiv pensioneraður, hevur hann havt betri tíð til síni frítíðaráhugamál, hann hevur seyð, hønur, dunnur.

Dania hjálpir vanliga til í familjufyritøkuni, klædnahandlinum, Rokoko, í Norðagøtu.

Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík sunnudagin 14. desember.

## Kaj Petersen heilsølumaður sjeyti



Mánadagin 15. desember verður Kaj Petersen, heilsølumaður í Tórshavn sjeyti. Kaj er dani og ættaður úr Viborg. Foreldur hansara vóru Ida og Anders Petersen, sum eisini vóru handilsfólk, og áttu og róku A/S Anders Petersens Farvehandel. Hesin handil er enn í familjuni og verður rikin av bróðursyni Kaj.

Undir krígnum noyddist Kaj sum lítil smádrongur at flýggja til Svøríkis saman við foreldrum og systkjum sínum undan týska hervaldinum. Har búleikaðust tey í nøkur ár til kríggið var liðugt, og komu síðani aftur til Viborg, har tey tóku virksemi teirra uppaftur.

Í 1964 giftist Kaj við Eyðbjørg, f. Mortensen, dóttur Jenny og Peter Mortensen av Hvítanesi á Tvøroyri, og fingu døturnar Annie og Berit. Áðrenn hetta var Kaj útbúgvin innan el-vinnuna og varð av AEG í Danmark sendur til Føroya at umboða teir. Stutta tíð eftir at vera komin til Føroya, stovnaðu hann og konan egna fyritøku, P/F Kaj Petersens Heilsøla. Seinni høvdu tey gávuhandilin Sóljuna, sum lat aftur fyri nøkrum árum síðani.

Kaj hevur duga væl at sett ferðina niður samstundis sum hann eldist, og í dag starvast bert hann og kona hansara í heilsøluni. Í áttatiárunum vóru 7 fólk í starvi hjá teimum. Hóast Kaj gjørdist føroyingur, varðveitti hann sítt egna móðirmál. Helt tað vera betri at tosa væl dankst enn illa føroyskt.

Á ferðum uttanlands er Kaj altíð hin fyrsti at ynskja seg heim aftur til Havnar til teldur og tøl. Hann er ein friðarligur og siðiligur maður, og tað er ikki hann, sum stendur í fremstu røð og ger vart við seg. Hóast hetta, munna nógv handilsfólk og onnur í Havn og kring alt landið bera kenslu á dámliga mannin við sínum stilla lyndi.

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line:

# Årets Akvamanileborger 2003

**Stjórin á Smyril Line, Óli Hammer, er kosin "Årets Akvamanileborger 2003". Hetta er 16. árið at hendan heiðurslønin verður latin. Í fjør var tað, Hendes Majestæt Dronningen, sum fekk heiðurslønina fyri 2002**



*Borgarstjórin í Hantsholm, Ejner Frøkjær og stjórin í Smyril Line, Óli Hammer*

Stýrið fyri Hanstholm Turistforening hevur í ár tikið avgerð um at heiðurslønin í ár skal fara til stjóran í Smyril Line, Óla Hammer, og til fyrrverandi leiðaran í "Rutelaget Askøj – Bergen A/S, Torvald Lahn - Johannessen.

Almenna móttøkan varð hósdagin 11. desember kl. 16.00 í býráðssalinum á Ráðhúsinum í Hantsholm, har formaðurin fyri Hanstholm Turistforening, Gunda Odgaard, handaði teimum akvamanile-medaljuna og heiðursbrævið. Eisini helt Ejner Frøkjær, borgarstjóri í Hanstholm, røðu, har hann m.a. grundgav fyri, hví Óli Hammer fekk hesa heiðurslønina. Hann segði m.a.

"Oli Hammer har gennem sit årelange forhold til Hanstholm vist den samme vilje til at planlægge langsigtet, tage de seje træk og satse.

Det gjorde han allerede i 1981 da han som kaptajn en gammel Mols-færge demonstrerede, at den godt kunne sejle på Nordatlanten, bare navnet var "Smyril" og den rigtige besætning var ombord.

Det der i første omgang var en satsning fra det færøske landsstyre blev siden til rederiet "Smyril Line" som med færgen M/F "Norröna" cementerede forbindelsen mellem Hanstholm, Færøerne, Shetlandsøerne og Island. Først på sommerbasis, og senest hele året, men altid med Oli Hammer som solid ankermand for den stadig større forretning, som i april i år satte den nye Norröna, nordatlantens cruisefærge, i rute som et synligt bevis på troen på forbindelsen".

# Kvívíkar kirkja 100 ár



*Mynd: Jens Kristian Vang*

Triðja sunnudag í advent 14. desember 2003 fyllir Kvívíkar kirkja 100 ár.

Hátíðarhaldið byrjar fríggjakvøld 12. desember við at musikkskúlin og skúlin hava framførslur í kirkjuni kl.19.00.

Hátíðardagin verður sum vant guðstænasta við altargongd, har Bjarni Bæk, dómpróstur, prædikar. Skriftarmál er kl.11.40.

Seinnapartin sama dag kl.16.30 verður fjølbroytt konsert við advents- og jólatónleiki. M.a. syngur barnakór í Kvívík. Vestmanna Sangkór syngur saman við sangarum úr Kvívík, og afturvið nøkrum av løgunum spæla tónleikarar úr Musikkskúlanum á floytu, klarinett og fagott. Urguleikari er Heðin Kambsdal.



UTTAN ÚR HEIMI

# 121 milliónir børn fáa onga skúlagongd

**Meiri enn 65 milliónir gentur um allan heimin fáa onga skúlagongd, og teirra framtíðarútlit eru døpur. Tær fara helst at doyggja í barsilssong ella at liva í stórum fátækradømi.**

121 milliónir børn um allan heimin ganga als ikki í skúla, 65 milliónir gentur og 56 milliónir dreingir. Tað er ein partur av niðurstøðuni, sum barnahjálpargrunnurin hjá ST, UNICEF, skrivar í síni nýggju ársfrágreiðing.

– Vit sleppa ikki av við fátækradømið og barnadeyða, eyðkvæmi og aðrar sjúkur ímillum børn, fáa vit ikki undirtøku fyri, at øll børn hava rætt til útbúgving, sigur leiðarin í UNICEF, Carol Bellamy.

Í ársfrágreiðingini verður endurtikið, at útbúgving er ein mannarættur, sum umfatar øll. Tað sama stóð í túsundárafrágreiðingini hjá ST, har øll limalondini bundu seg til at geva sínum børnum og ungu útbúgving, og at hesi viðurskiftini skulu koma í rættlag í seinasta lagi í 2015. Eftirkanningar hjá UNICEF hava víst, at summi lond leggja størri dent á at útvega dreingjunum skúlagongd enn gentunum. Hetta er serliga galdandi í afrikonsku londunum sunnan fyri Sahara. Har fingu 24 milliónir gentur onga skúlagongd í fjør.

Í einstøkum arabiskum londum stendur heldur ikki ov væl til. Eitt nú ganga bara 58 prosent av gentunum í Saudiarabia í skúla.

# Javnaðarflokkar framgongd

*Hevði fólkatingsval verið í Danmark nú, hevði Mogens Lykketoft komið í forsætisráðharrasessin*



**Í Danmark høvdu Sosialdemokratarnir vunnið stórsigur, var fólkatingsval nú, og í Noregi hevur Arbeiðaraflokkurin stóra framgongd.**

VELJARAKANNINGAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sosialdemokratarnir í Danmark við Mogens Lykketoft á odda hava rættiliga fingið vind í seglini, og eitt val nú hevði uttan iva sett Mogens Lykketoft í forsætisráðharrastólin.

Sambært einari veljarakanning í BT í gjár høvdu Sosialdemokratarnir fingið 33,7 prosent, var val til Fólkatingið nú. Tað hevði givið flokkinum 61 tinglimir ella fimm fleiri enn eftir einari kanning í oktober.

Samstundis hevur Vinstri hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, støðuga afturgongd. Eftir nýggju kanningini hevði flokkurin fingið 47 tinglimir. Sostatt høvdu Sosialdemokratarnir fingið 14 tinglimir fleiri enn Vinstri, var fólkatingsval nú. Haraftruat vísir kanningin hjá BT, at Mogens Lykketoft hevði kunnað skipa stjórn saman við Radikala flokkinum, Sosialistiska Fólkaflokkinum og Eindarlistanum. Teir fýra flokkarnir høvdu fingið 95 tinglimir, meðan verandi stjórnarflokkar og Danski Fólkaflokkurin bert høvdu fingið 80.

Mogens Lykketoft sigur við BT, at gongdin ivaleyst kemst av, at fólk hava ikki álit á, at stjórnin kann loysa arbeiðsloysistrupulleikan. Harafturat hevur stjórnin trupulleikar við trúvirðinum á fleiri økjum, sigur hann.

Gongdin í Noregi er tann sama sum í Danmark. Har fær Arbeiðaraflokkurin sambært einari nýggjari kanning 29,3 prosent, og so stóra undirtøku hevur flokkurin ikki havt síðani stórtingsvalið í 1997. Kanningin vísir, ar Arbeiðaraflokkurin hevði fingið væl fleiri atkvøður enn allir stjórnarflokkarnir tilsamans, var val til Stórtingið nú.

## Krevja framvegis revsitoll

ES hevur avgjørt, at revsitollur skal framvegis leggjast á síl úr Noregi. Revsitollurin, sum kom í gildi í september, er 21,4 prosent. Frammanundan var tann vanligi tollurin bara 3,6 prosent.

Upprunin til avgerðina at leggja revsitoll á norsk síl var ein kæra frá finskum sílaalarum, sum vildu vera við, at norskir alarar høvdu selt síl fyri undirprís á ES-marknaðinum bæði í 2001 og í 2002. Norðmenn hava roynt at vísa hesum aftur, og umboð fyri norsku alararnar hava verið í Bruxelles og greitt frá viðurskiftunum.

Men higartil hevur ES ikki viljað broytt avgerðina, og mikudagin boðaði Bruxelles frá, at avgerðin verður ikki endurskoðað fyrr enn í mars. Samstundis gjørdi ES-nevndin greitt, at hennara kanningar hava víst, at finsku sílaalararnir høvdu rætt. Tí stendur revsitollurin við.

## Fáa onga ísbjørn

Djóragarðurin í Keypmannahavn ætlar sær at fáa sær eina ísbjørn afturat. Leiðslan vendi sær tí herfyri til grønlendsku myndugleikarnar og bað um loyvi at fanga eina ísbjørn har og at flyta hana til Keypmannahavnar, men landsstýrið í Nuuk segði nei.

Stjórin í grønlendsku veiði- og fiskivinnuumsitingini, Amalie Jensen, sigur við Politiken, at fara grønlendingar at útflyta livandi villdjór, er vandi fyri, at altjóða samfelagið fer at seta seg upp ímóti tí. Hon sigur, at tann ísbjørnin er ikki eitt hótt djóraslag, men at nóg mikið verður veitt av teimum grønlendsku stovnunum. Veiðimenninir hava kvotu, og fara vit at útflyta bjarnir, vænti eg, at tað fer at fáa øði í fólk, sigur Amalie Jensen.

Djóragarðurin í Keypmannahavn hevur tvær ísbjarnir. Tær eru 32 og 33 ára gamlar og eru millum tær elstu, sum finnast í djóragørðum. Tey seinastu árini er heilsa teirra farin at bila, og tí ætlaði djóragarðurin at fáa sær aðrar úr Grønlandi ístaðin fyri. Men tað gongur ikki.

## Vánalig útgerð móti oljudálking

Kemur eitt oljutangaskip í havsneyð í Barentshavinum, og neyðugt verður at pumpa oljuna úr tí, eru norsku tilbúgvingarmyndugleikarnir illa fyrireikaðir. Tað heldur deildarleiðarin fyri tilbúgvingini í Norðurnoregi.

Hetta er annars beint tað øvugta av tí, sum Svein Ludvigsen, fiskimálaráðharri, segði fyri stuttum. Hann vísti á, at tilbúgvingin í Norðurnoregi hevði fingið eitt hjálparskip afturat, so nú vóru viðurskiftini í lagi. Men sambært deildarleiðaranum, Johan Marius Ly, er tann nýggja útgerðin bara egnað til at pumpa viðgjørda ráolju og ikki ráolju úr einum av teimum stóru tangaskipunum, sum regluliga sigla fram við norðurnorsku strondini.

Umleið 60 prosent av oljuni, sum verður flutt hendanvegin, er ráolja, og tí er tilbúgvingin á ongan hátt nøktandi, sigur Johan Marius Ly við norska útvarpið. Kemur eitt tangaskip við ráolju í havsneyð, og oljan skal pumpast úr tí, er neyðugt at fáa egnaða útgerð úr Bodø, og tað tekur alt ov langa tíð, sigur hann.

## Pensjonistur smuglaði

Norska løgreglan tók hósnáttina ein 70 ára gamlan mann, sum hevði næstan eitt kilo av kokaini uppi á sær.

Maðurin er ættaður úr Sveits. Hann var farin haðani til Svøríkis og var á veg við bussi um norska markið, tá hann bleiv tikin. Tað vísti seg, at hann hevði fjalt næstan eitt kiilo av kokaini í skónum og ymsastaðni á kroppinum. Tveir aðrir menn, sum fylgdust við tí 70 ára gamla, vórðu eisini tiknir.

Ein talskvinna hjá norska tollvaldinum rósti í gjár tollarunum, sum komu fram á kokainið. Í fyrra lagi er tað ikki vanligt, at 70 ára gomul fólk verða tikin fyri at smugla rúsevni, og í øðrum lagi hevði maðurin fjalt tað væl.